## Skulu verja hermenn

Myndugleikarnir í Ísrael hava gjørt av at skipa ein serfrøðingabólk, sum skal verja ísraelskar hermenn, ið kunnu komu undir ákæru fyri krígsbrotsverk í Gaza-geiranum. Tað var Ehud Olmert, forsætisráðharri, sum boðaði frá avgerðini nat skipa bólkin, og sambært eygleiðarum er hon eitt tekin um, at Ísrael veruliga ber ótta fyri, at hermenn kunnu blíva ákærdir fyri krígsbrotsverk undir krígnum í Gaza-geiranum. Olmert segði, at ísraelska ríkið styðjar sínar hermenn, og at hermenninir mugu fáa vissu fyri, at teir verða ikki revsdaðir fyri tað, sum teir gjørdu í landsins tænastu.



## Enn ein norskur bjargingarpakki

Norska stjórnin hevur gjørt av at brúka 20 milliardir norskar krónur til at tálma avleiðingunum av fíggjarkreppuni. Kristin Halvorsen, fíggjarmálaráðharri, sigur við norsku fjølmiðlarnar, at endamálið við pakkanum er at forða fyri arbeiðsloysi. Sambært henni er talan um tað munabesta tiltakið, sum er sett í verk í Noregi tey seinasdtu 30 árini. Stjórnin hevur gjørt av at lata góðar 16 milliardir krónur til ymisk tiltøk, og góðar tríggjar milliardir skulu brúkast til ymisk skattatiltøk, ið skulu hjálpa vinnufyritøkum. Herumframt fáa kommunurnar góðar seks milliardir krónur, og knappar fýra milliardir eyka skulu brúkast til samferðsluna.

### Lógir

**LOVBEKENDT-GØRELSE NR. 100 FRÁ 2. MARTS 1988 OM OFFENTLIG FORSORG, SUM SEINAST BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 99 FRÁ 1. NOVEMBER 2007**

**§ 32. 2) 12)** Til brug for personer med særlige behov kan landsstyret oprette eller godkende særlige institutioner. Landsstyret kan fastsætte regler for sådanne institutioners drift, herunder om optagelse og betalingsforhold.
*Stk. 2.* Til brug for personer med særlige behov kan landsstyret oprette eller godkende bofællesskaber. Landsstyret fastsætter regler for bofællesskabernes drift, herunder optagelse og betalingsforhold.
**§ 33. 18)** For kommuner med mindre end 2.000 indbyggere træffes afgørelser efter denne lov af Landsstyrets Socialforvaltning.
*Stk. 2.* For kommuner med mindst 2.000 indbyggere træffes afgørelser om ydelse af hjælp efter **§ 13,** *stk. 1 og 2*, af vedkommende kommunalbestyrelse eller af et af denne nedsat socialt udvalg, medens andre afgørelser træffes af Landsstyrets Socialforvaltning.
**§ 40. 4) 20)** Útreiðslur sambært hesi lóg verða rindaðar av landskassanum.

- Útfrá hesum lógarteksti og LØGTINGSLÓG NR. 166 FRÁ 22. DESEMBER 2005 UM STUDNINGSLÁN TIL ELLIS- OG RØKTARHEIM OG ELDRASAMBÝLI síggja vit, at kommunur kunnu byggja ellis-, røktarheim og eldrasambýli. Men tað stendur ongastaðni, at tað er álagt kommunum at byggja ellis-, røktarheim og eldrasambýli, sigur Eyðun M. Olsen, virkandi aðalstjóri í Almannamálaráðnum.

eij

# Havnin manglar minst 110

**Í Eysturoynni eru so nógv búpláss fyri eldri, at tey á Strondum ikki fingu stuðul frá landinum til at byggja eitt eldrasambýli. Í Suðurstreymoy eru bara 149 pláss til eldri. Hetta eru bara fimm pláss fleiri enn í Eysturoynni, har fólkatalið bara er helvtina av tí í Suðurstreymoy. – Havnin hevur ikki røkt sína skyldu, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður. Heðin Mortensen peikar hinvegin á landið**



ELDRAØKIÐ
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hans Pauli Strøm, fyrrverandi landsstýrismaður í almannamálum heldur, at Tórshavnar kommuna hevur misrøkt sína skyldu viðvíkjandi teimum eldru í kommununi.

- Í Eysturoynni og Sundalagnum hevur mann seinastu árini bygt eini 110 búpláss til eldri. Samstundis hevur mann í Havn bygt eini 50 pláss. Hetta kann mann ikki síggja á ein øðrvísi hátt, enn at kommunan ikki hevur røkt sína skyldu, sigur Hans Pauli Strøm.

- Haldi tú hevur fingið skeiva adressu. Tað stendur ongastaðni at kommunurnar skulu røkja eldraøkið, men vit hava gjørt nøkur pláss av neyð, tí landið ger onki, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn.

Hans Pauli Strøm vísir á, at hann er harmur um, at Tórshavnar kommuna ikki hevur verið ein aktivur leikari á eldraøkinum, á sama hátt, sum í Eysturoynni til dømis, har stórar útbyggingar hava verið í seinastuni.

### Havnin komin í gongd

- Í Havnini er mann nú komin í gongd við at gera nøkur ting, og tað er bara gleðiligt, sigur Hans Pauli Strøm.

Heðin Mortensen vísir á, at Tórshavnar kommuna hevur fingið stuðul til nøkur frá projekt, og greiðir somuleiðis frá, at hini økini, sum hava bygt eldraøkið út, øll hava fingið stuðul frá landinum.

- Vit fingu stuðul til nøkur fá ting og eru í gongd við at byggja nøkur ting, hóast tað er ein landsuppgáva at útbyggja eldraøkið, sigur borgarstjórin í Havn. Hann heldur tað eisini vera løgið, at landið raðfestir tunlar og vegir, meðan eldraøki bara fær tað verri.

### Leggjast út til kommununar

Heðin Mortensen og Hans Pauli Strøm eru tó samdir um, at eldraøkið kann leggjast út til kommunurnar.

- Eg havi fleiri ferðir skotið upp at leggja eldraøkið út til kommunurnar. Tað hevði gjørt vegin til avvarðandi myndugleikan styttri, men kommunalu eindirnar mugu vera so mikið sterkar, at tær megna at lyfta uppgávuna, sigur Hans Pauli Strøm. Hann leggur afturat, at tað hevði verið ein møguleiki at nýta Tórshavnar kommunu til eitt royndarøki.

Heðin Mortensen greiðir somuleiðis frá, at kommunan fegin vil hava eldraøkið.

- Vit hava boðið okkum fram sum royndarkommuna, men tað hevur ikki borið til, sigur Heðin Mortensen.

### Fólk vilja búgva heima

Heðin Mortensen ivast eisini, um tað er ein gongd leið at hava so nógv búpláss til eldri.

- Tað vísir seg, at fólk vilja búgva heima so leingi tey kunnu, og tí skuldi mann heldur givið Nærverkinum meiri pening, so tey eldru kunnu fáa hjálp meðan tey búgva heima. Hetta hevur mann bara ongan áhuga í, og sum seinastu jólagávuna var peningurin til tilhaldini eisini skorin burtur, sigur Heðin Mortensen, sum øtast av førda politikkinum. Hann undrast eisini á, at Tórshavnar kommuna hevur fingið so lítið av stuðli frá landinum til eldraøkið, tí tørvurin hevur verið so stórur í Suðurstreymi alla tíðina.